Starvslýsing

Heimatænastan

## Økisleiðari til Heimatænastuna í Suðurstreymoy

Nærverkið søkir eftir økisleiðara til Heimatænastuna í Suðurstreymoy, øki 1.

Heimatænastan í Suðurstreymoy veitir tænastu til umleið 500 borgarar í Suðurstreymoy. Tænastan fevnir um sjúkrarøkt, uppvenjing, vegleiðing, heilsuhjálp og røkt.

Í Heimatænastuni í Suðurstreymoy starvast á leið 140 starvsfólk. Tvey eldrasambýlir og eitt dagtilhald fyri minnisveik hoyra til øki 1. Økisleiðarin hevur tilvísing til leiðaran fyri eldraøkið.

**Høvuðsuppgávur:**
- Daglig leiðsla av heimatænastuni í øki 1
- Ábyrgd av góðskuni av veittu tænastuni til borgaran
- Ábyrgd av at fíggjarætlanin innan økið verður hildin innan játtaða karmin.
- Gera uppskot til fíggjarætlan fyri økið.
- Partur av leiðslutoyminum fyri økisleiðarar í Heimatænastuni í Føroyum.

**Førleikakrøv:**
- Heilsufakliga ella aðra viðkomandi útbúgving
- Royndir innan leiðslu og fyrisiting
- Er førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum
- Er bjartskygd/ur og opin fyri nýhugsan
- Er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran fyri eldraøkið, Gunnleyg Durhuus, tlf. 304020

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett skjótast gjørligt. Setanarstaðið er Nærverkið við tænastu í løtuni í Suðurstreymoy. Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsókn:**
Send eina umsókn við avrit av prógvi og upplýsingum um útbúgving og fakligar roynir til:

Nærverkið
Postboks 3037
110 Tórshavn

Stílað: Gunnleyg Durhuus, leiðari fyri eldraøkið

**Umsóknarfreist: 24. august 2007**

## Varaleiðari til Heimatænastuna í Suðurstreymoy

Nærverkið søkir eftir varaleiðara til Heimatænastuna í Suðurstreymoy, øki 1.

Heimatænastan veitir heimahjálp og røkt til umleið 500 heimabúgvandi borgarar og borgarar á Eldrasambýlum í Suðurstreymoy.

Í Heimatænastuni í Suðurstreymoy starvast á leið 140 starvsfólk. Varaleiðarin arbeiðir í tøttum samstarvi og samskifti við brúkarar, starvsfólk og økisleiðara og tryggjar góðskuna av veittu tænastuni. Varaleiðaran hevur tilvísing til økisleiðaran.

**Høvuðsuppgávur:**
- Leiða og fordeila arbeiðið við atliti til tørvin hjá brúkaranum
- Leggja til rættis og luttaka í starvsfólkamenningini og fakligu menningini
- Viðvirka til støðugt økt samstarv millum starvsfólkabólkarnar, eldrasambýlini og heimatænastuna í økinum.
- Hava eftirlit við veittu tænastuni.
- Hava eftirlit við lønarútgjaldinum.
- Hava ábyrgdina av samskipanini við lesandi og næmingum.

**Førleikakrøv:**
- Hevur heilsufakliga ella aðra viðkomandi útbúgving
- Hevur hug og hegni at fyrisita og leiða
- Evnar at samstarva við brúkarar, avvarandi, starvsfólk og leiðslu
- Hevur royndir og kunnleika innan primeru og sekunderu heilsutænastuna
- Er bjartskygd, opin fyri nýhugsan og tænastusinnað

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir í fyrisiting og leiðslu eins og kunnleika til teldu á brúkarastøðu.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til økisleiðaran á telefon 31 72 49.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett skjótast gjørligt. Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarstaður er Nærverkið við tænastu í løtuni í Suðurstreymoy.

**Umsókn:**
Send eina umsókn við avrit av prógvi og upplýsinum um útbúgving og fakligar royndir til:

Nærverkið
Postboks 3037
110 Tórshavn.

Stílað: Gunnleyg Durhuus, leiðari fyri eldrøkið

**Umsóknarfreist: 24. august 2007**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo






**Skene House Rosemount**

**3.215.-**

Fyri hvønn um 6 fólk deila íbúð

Á Rosemount er sjálvgerðar-morgunmatur. Rosemount er roykfrítt, men serlig støð eru gjørd uttanfyri til roykjarar.

www.skene-house.co.uk



**Brentwood Hotel**

**3.305.-**

Fyri hvønn í dupultkamari

Á Brentwood Hotel er skotskur morgunmatur. Hotellið er sera hugnaligt og liggur mitt í býnum. Royn eisini matstovuna og pubbin á kvøldi.

www.brentwood-hotel.co.uk



**Patio Hotel**

**3.590.-**

Fyri hvønn í dupultkamari

Á Patio Hotel er skotskur morgunmatur. Hetta er eitt nútímans hotell við svimjihyl, hitarúm, venjingarrúm, og einari frálíkari matstovu og barr.

www.patiohotels.com

Íroknað er: Flogferð við øllum avgjøldum og innivist í 3 nætur við morgunmati.

Bílegg ferðina hjá Atlantic Airways

Tel 34 10 10
Fax 34 10 01

ATLANTIC AIRWAYS

atlantic.fo